# Neyst í Álakeri til sølu

Eitt gott neyst í Álakeri verður við hesum lýst til sølu.

Tak, hurðar, vinda, vognur, spæl, spælskinnari o.a. eru í góðum standi.
El og vatn eru innløgd.

Tað er djúpt út fyri, og gott er at taka bát upp bæði á flóð og fjøru. Eisini eru atkomuviðurskiftini frá landi sera góð.

Áhugað kunna ringja til tel. 21 38 00 ella 321666

WWW.SMYRIL-LINE.COM




**Søkt verður eftir 2. stýrimanni til M/F Norrönu.**

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal hava vinnubræv sum skipsførari og skal hava royndir innan altjóða sigling við ferðamannaskipi.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

*Smyril Line*
*J. Broncks gøta 37*
*Postsmoga 370*
*FO-110 Tórshavn*

Ella við t-posti til: ***management@smyril-line.fo***

og skulu vera okkum í hendi innan 13. apríl 2004

J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo




FRISØRSVEINUR TIL FRÍÐKUNA Í SMS

OKKARA HÁRFRÍÐKANARTEAM MANGLAR EIN GLAÐAN, ARBEIÐSSAMAN OG FYRIKOMANDI PERSÓN AT ARBEIÐA SAMAN VIÐ.

UM TAÐ ERU NAKRIR TÍMAR ELLA FULLA TÍÐ, TAÐ KUNNU VIT TOSA UM. LØN EFTIR AVTALU.

**RING ELLA SEND EINA UMSÓKN TIL:**

FRÍÐKAN Í SMS
POSTMOGA 1047
110 TÓRSHAVN

FRÍÐKAN
SMS • 312701

Krosstein www.krosstein.fo

Pf. Svend

## Skrivstovulærlingur søkist

Kundi tú hugsa tær eina framtíð innan skrivstovuyrkið?

Vit hava pláss fyri einum skrivstovulærlingi (m/k) í fyritøku okkara.

Vit kunnu bjóða tær:
• Eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu í støðugari menning, har tú gerst partur av einum góðum »teami«, og har arbeiðsandin er av teim bestu
• tryggar arbeiðsumstøður
• góðar møguleikar fyri persónligari menning

Tú mást hava HH ella FHS prógv.
Lærutíðin er ávikavist 2 ella 3 ár.
Tú mást vera fryntlig/-ur, samstarvsáhugað/-ur, ágrýtin og til reiðar at taka við nýggjum lærdómi og ikki vera bangin fyri til tíðir at arbeiða undir trýsti.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til okkara og tosa við Svend Krosstein ella Anniku Krosstein.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við prógvum og ummælum til:

Sosialurin 341800

**P/F Svend Krosstein**
**Falkavegur 6, Postboks 3229**
**FO-110 Tórshavn**
**Viðm. »Lærupláss«**

*PF. Svend Krosstein er ein fyritøka í støðugari menning, sum í løtuni hevur 19 fólk í fulltíðarstarvi. Pf Svend Krosstein er einasta VVS-heilsøla í Føroyum og hevur harafturat størsta VVS-handilin í landinum. Vit selja alt tilfar til vatnveitingar, hitaverk, sanitet og ventilatión. Eisini selja vit byrsur, patrónir, fiskareiðskap og annað.*

VHS Alt tilfar til VATN · HITAVERK · SANITET · VENTILATIÓN

Falkavegur 6 · FO-110 Tórshavn
Tel. 34 46 00 · Fax. 34 46 01
E-mail: krosstein@krosstein.fo

# Til sølu



Ein Nissan Patrol 3.0 Turbo diesel, 2 setur, el-leðursetur v/ hita, el-sóltak, klimaanlegg, árg. 11/2000. Verður seldur um hóskandi boð fæst.
Prísuppskot: 230.000 kr.

Áhugað kunnu venda sær til vinnulívsdeildina á tlf. 31 13 50.

**Føroya Banki**

# Evnisdagur

## fyri leiðandi sjúkra-røktarfrøðingar

Fakligur áhugabókur fyri leiðandi sjúkrarøktarfrøðingar, FÁ6, skipar fyri evnisdegi
**týsdagin 13. apríl 2004**
**frá kl. 10.00 til kl. 14.00 á Hotel Føroyum.**

**Evni:**
Professionell í deildarleiðslum.

Dagurin verður hildin við Sanne Sognsstup, cand.scient.adm.

Byrjað verður við einum drekkamunni kl. 9.30 og morgunmatur verður á middegi.

**Kostnaður:**
350 kr. fyri hvønn, sum skal gjaldast á konto í Suðuroyar Sparikassa, konto nr. 9870-102.095.2.

**Tilmelding hjá:**
Idu Sørensen, tlf. 317339 ella 314969, ella teldupostur: idasor@torshavn.fo

**Tilmeldingarfreist:**
Týsdagin 6. apríl.

Allir sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava leiðslu sum virkisøki ella áhuga fyri leiðslu, kunnu luttaka.

**Nevndin í FÁ6**

## HANDILSLÆRLINGUR TIL ÍTRÓTTUR Á GLYVRUM

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara á Glyvrum at byrja skjótast tilber.
Starvið er fjølbroytt, spennandi og áhugavert fyri tann ið dámar væl at umgangast viðskiftafólk.
Tað er eisini møguleiki fyri at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Lærutíðin við HH er 2 ár, og við FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark 3 ferðir.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur

Um tú ert tann rætti kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum, samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postmoga 268
FO-110 Tórshavn

Sosialurin 341800

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR • N. Finsensgøta 5 • Postsmoga 268 • 110 Tórshavn
Tel. 355 300 • E-mail: sportthd@post.olivant.fo

Sosialurin Sosialurin -har tað hendir



# Sosialráðgevi á Almannastovuni

Søkt verður eftir sosialráðgeva til økisdeildina í Suðuroy at arbeiða fulla tíð frá 1. mai at rokna ella skjótast til ber eftir henda dag.

**Um deildina**
Á økisdeildini á Tvøroyri arbeiða 4 fólk.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er at:
- ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni
- í serligum førum vísa til landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni

Tær sosialu fyriskipanirnar, ið økisdeildin serliga tekur sær av, eru
- ymiskar fyriskipanir sambært forsorgarlógini
- persónlig viðbót til pensionistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensjónir

Økið hjá deildini er Suðuroy.

**Førleikakrøv**
- sosialráðgevaraútbúgving
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga
- góð samstarvsevni

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at enda sær til John Mortensen, deildarleiðara, á 353560.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera

**Almannastovuni,**
postsmoga 58,
800 Tvøroyri,

í hendi í seinasta lagi 19. apríl 2003.

**Um Almannastovuna**
*Fyri at betra um tænastustøðið hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar.*
*Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taka avgerðir.*
*Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjóns-, dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m.*
*Stovnurin umsitur fyri umleið 800 mill. kr. og her arbeiða umleið 100 fólk. Almannastovan hevur almannamiðstøðir í Tórshavn, Suðuroy, Eysturoy og í Norðoyggjum, og harumframt fevnir stovnurin um Hjálpartólamiðstøðina og aðrar landsdekkandi serdeildir.*



Hestprent gevur pappírinum betri flog

HESTPRENT

# Ársfundur í KSF

**(Kvinnufelagssamskipan Føroya)**

**verður í Vági dýra biðidag 7. mai 2004**

Fundarskrá sambært lógini.

Uppskot til viðgerðar á fundinum skulu sendast til KSF, postboks 1013, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 25. apríl.

Fundurin verður settur
**kl. 13.00 í hølum Vágs Matmøðrafelags.**

Tey, ið ætla sær at vera við, skulu siga frá í seinasta lagi 30. apríl á telefon
**373960, 373169 ella 373054**

# Námsfrøðilig ráðstevna

**Námsfrøðilig ráðstevna um trivnað hjá børnum verður hildin í Norðurlandahúsinum í døgunum 17. og 18. september.**

Ráðstevnan er fyri starvsfólk á dagstovnum, dagrøktarar, frítíðarskúlar, barnaverndarlimir, heilsusystrar, sosialráðgevarar, kommunu og landspolitikkarar og onnur við áhuga fyri evninum.

**Fríggjadagur 17. september**
Kl. 08.30–09.00 Morgunkaffi
Kl. 09.15–11.00 Erik Sigsgaard tosar um evnið: "Børn og daginstutioner" Hvat er ein góður stovnur?

*Erik Sigsgaard hevur millum annað undirvíst á Danmarks Lærerhøjskole. Hann hevur granskað nógv um børn á stovnum, um samskiftið millum børn og vaksin, og um tey vaksnu, soleiðis sum børn uppliva tey. Hann hevur skrivað fleiri bøkur og smárit um evnið.*

Kl. 11.00–11.30 Kaffi
Kl. 11.30–12.30 Erik Sigsgaard heldur fram um sama evnið.
Kl. 12.30–14.00 Døgurði.
Kl. 14.00–15.00 Erik Sigsgaard tosar um bókina: "Skæld ud:" "At skelda er at sláa børnini við orðum," segði ein genta einaferð við høvundan. Hjálpir at skelda og hvørji árin hevur hetta á børnini?

Margrethe Brun Hansen tosar um bók hennara: "De kompetente forældre. "Sig mær hvussu foreldur tykkara eru, og eg kann siga tykkum hvussu tit eru," kundi bókin eisini itið, skrivar høvundurin í formælinum. Nógv børn hava tørv á foreldrum, ið vilja og tora at vera viðleikarar í teirra gerandisdegi.

*Margrethe Brun Hansen er útbúgvin námsfrøðingur og cand. psych. Hon hevur millum annað havt sína dagligu gong á 45 stovnum í Danmark sum sálarfrøðingur hjá Landsforeningen Frie Børnehaver og Fritidshjem.*

**Leygardagur 18. september**
Kl. 08.30–09.00 Morgunkaffi
Kl. 09.30–10.30 Margrethe Brun Hansen tosar um "Den nye forældregeneration", út frá tí veruleika, at samfelagið hevur broytt seg so nógv, at børn, foreldur og stovnar hava fingið heilt aðrar treytir at virka undir. Skilir stovnurin tað nýggja ættarliðið av foreldrum?
Kl. 10.30–11.00 Kaffi
Kl. 11.00–12.00 Margrethe Brun Hansen heldur fram um sama evnið.
Kl. 12.00–13.00 Døgurði
Kl. 13.30–14.30 Virkisstovur
1. Foreldraførleiki
*Minna Poulsen og Jóngerð Poulsen, heilsufrøðingar, fara at siga frá um foreldraførleika. Góður foreldraførleiki er, tá foreldur ongar før fyri at geva barninum kærleika gjøgnum tað foreldrið sigur, ger og er.*
2. Sálarligt arbeiðsumhvørvi á dagstovnunum.
*Marjun Nielsen, sálarfrøðingur, fer at røða um hvussu børn hava tað í Føroyum, hvussu tað sálarliga umhvørvið er á dagstovnum og í heiminum. Hvat skal til fyri at børn trívast?*
3. Fráboðaranskylda-Tagnarskylda.
*Tonja Ziskason, sosialráðgevi og Jórun Niclasen, sernámsfrøðingur, fara at røða um hvussu vit umsita fráboðaranskyldu og tagnarskyldu í dagliga samstarvinum við foreldur og aðrar samstarvsfelagar. Hvussu skulu vit fráboða og hvussu skal ein fráboðan orðast?*

**Kostnaður:**
Kr. 1200,- fyri báðar dagarnar, alt íroknað.

**Tilmelding:**
Tilmeldingin fer fram í Býlingshúsinum undir Brúnni, Smærugøta 9 B, 100 Tórshavn. Tel. 319180. Teldupostur: u-brunni@torshavn.fo

Seinasta tilmeldingarfreist er 1. juli og tilmeldingin er bindandi.

**Fyrireikingarbólkurin**